gult cyan magenta svart

StÍF-Neistin 24-26 (16-12)

StÍF snáva›i

Strandingar førdu vi› seks málum eitt skifti í seinna hálvleiki, men Neistin svara›i aftur, og dysturin vendi brádliga. Havnarmenn tóku strandingar á bóli og vendu tapinum til ein tvey máls sigur

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

Ta› vóru nakrir sera vónbrotnir strandingar, sum fóru úr høllin á Skála sunnudagin. Teirra li› hev›i ført vi› f‡ra málum vi› ste›gin, og StÍF økti eisini lei›sluna upp í seks mál í seinna hálvleiki. Hóast ta› fór StÍF tómhent avsta› aftur.

Neistin tók sær brádliga um reiggj í seinna hálvleiki og hála›i alt inn aftur eftir lítlari løtu. Eftir stó›u strandingar eitt sindur ovfarnir av neistamonnum, sum vunnu vi› tveimum málum, og teir eru avgjørt vi› í strí›num um hei›ursmerkini.

Vi› hesum sigrinum hava teir víst, at dugur er í teimum, og teir fara ikki at vera afturút sigldir í hesum kappingarárinum.

StÍF ste›ga›i upp

Seinastu tjúgu minuttirnar fekk StÍF bara eini tvey mál, og einki vildi ber til hjá teimum. Neistin var flúgvandi hesa løtuna.

- Vit hildu okkum hava vunni› dystin, tá vit førdu vi› seks málum, og so lítil tí› var eftir, sigur málverjin hjá StÍF, Jóhan Danielsen. StÍF var eisini væl betri í byrjanini og eitt petti inn í seinna hálvleik, men ein dystur er í 60 minuttir vísir Jóhan á, og spælast skal allatí›ina.

Jóhan Danielsen heldur, at orsøkin til, at dysturin brádliga vendi, er, at teir mistu nógvar bóltar í uppspælinum, tá teir vóru á veg frameftir. Solei›is fekk Neistin fleiri álop móti endanum, har teir vóru einsamallir vi› málverjanum.

Ta› var sostatt ikki vánaligt verjuspæl, sum hev›i vi› sær at StÍF dragna›i, men heldur vánaligt álopsspæl, heldur Jóhan Danielsen. Hann leggur afturat, at málverjin hjá Neistanum stó› ómetaliga væl móti endanum. Harafturat brendi heimali›i› eisini tr‡ brotsspørk í dystinum.

StÍF enn størsta hóttanin

Í løtuni er VÍF í einum flokki fyri seg, men StÍF er framvegis tann størsta hóttanin hjá vestmenningum hóast tapi› í dag. Okkurt bendir kanska á, at StÍF hevur mist stevi› vi› hesum ósigrinum, tí slíkar lei›slur mugu ikki tveitast fyri bor›, um teir skulu gera sær nakrar vónir um at koppa VÍF av trónuni.

– Vit trúgva avgjørt enn uppá, at vit kunnu vinna meistaraheiti›. Tá vit vunnu FM seinast, vóru vit fleiri stig aftanfyri enn vit eru nú, so ta› ber sjálvandi til. Kyndil hevur eisini víst í hesum leikumfarinum, at ta› ber til at spæla upp vi› vestmenningar, sigur Jóhan Danielsen.

Tá komi› er í helvt ver›ur helvtin av stigunum tikin frá øllum li›unum, tískil ver›ur lei›slan hjá VÍF ikki eins stór og hon er nú.

Neistin er framvegis á fimta plássi, men vandi var fyri, at um teir ikki vunnu í dag, høvdu teir veri› eitt fitt petti aftanfyri tey fremstu li›ini. Teir halda tó framvegis grannarnar úr Kyndli og H71 í stuttum tjó›ri, og kunnu ver›a ein hóttan.



StÍF hev›i tamarhald á stóran part av dystinum, men brádliga koppa›u neistamenn øllum á høvdinum, og avgjørdu dystin til egnan fyrimun

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
StÍF: Jón Rasmussen 4, Artur Johansen 4(1), Marius Joensen 4, John Petersen 4(1), Leivur Justinussen 3, Costin Dumitrescu 3, Kristjan Petursson 2
Neistin: Jákup Sverri Kass 7(3), Jacob Jónsson 6, Ári Rouch 4, Ræni Slættanes 4, Áki Mørk 3(1), Regin Didriksen 1, Helgi Justinussen 1
Brotskøst: StÍF 5, Neistin 5
Útvísingar: StÍF 5, Neistin 5
Diskvalifikatión: Neistin 1 (3x2 minuttir)
Dómarar úr H71: Kristian M. Skála og Petur S. Dahl

Stjørnan-Sóljan 29-14 (13-6)

Stjørnan tók sær av løttum

Venjarin hjá Sóljuni heldur, at li›i› hevur trupult at koma nóg skjótt aftur í verjustø›u, men at ta› annars ikki var nógv at gera móti Stjørnuni

Í einum naka› deydligum dysti vann Stjørnan sera sannførandi á Sóljuni í Klaksvík. Úrsliti› vísir, hvussu stórur munur er á toppinum og botninum í føroyskum kvinnuhondbólti. Eingin ivi tykist tó at vera um, at slagi› um FM ver›ur millum Stjørnuna og VÍF

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

Ta› tykist ikki vera nakar ivi millum hondbóltsáhuga›, at antin Stjørnan ella VÍF fer at vinna FM í ár, hóast kappingin ikki er hálvrunnin enn.

Stjørnan tók enn eitt stig til at endurvinna meistaraheiti›, tá øll mótstø›a frá Sóljuni var› kveistra› til viks uttan stórvegis hóvasták.

Sóljan og Stjørnan møttast aftur í Klaksvík t‡skvøldi› í steypakappingini, men fremst í huganum hjá klaksvíkskvinnum er óiva› dysturin móti VÍF næsta vikuskifti› í Vestmanna.

Deydligur dystur

Stjørnan leg›i hart út og lat onganti› nakran iva vera um, hvør skuldi hava tey tvey stigini. Tí var spenningurin ikki tann stóri millum ásko›ararnar. Heldur ikki var dysturin av teimum best spældu. Nógv álopsmistøk vór›u gjørd av bá›um li›um, og fleiri málmøguleikar fóru fyri skeyti›.

– Vit kundu havt fingi› nógv fleiri mál, og vit vóru nakrir ordiligir brennivargar, sigur Sólvá Eystberg hjá Stjørnuni.

Stjørnan valdi ikki at mansverja Simonu Dziugyte, sum er størsta álopshóttanina hjá Sóljuni. Tær vardu í eini skeivari 5-1 skipan, har Joan M. Joensen vardi frammanfyri.

Vesna Tomajek spældi bara eina heilt lítla løtu í seinna hálvleiki, tí hon hevur ein lítlan ska›a, men hon vísti, ta løtuna hon spældi, at hon er ein tann vandamiklasti spælarin, sum Stjørnan eigur. Andriana Milodanovic er heldur ikki vi›. Hon hevur júst fingi› gipsi› av aftur beininum, og hon byrjar ikki at venja av álvara fyrr enn sí›st í næsta mána›i.

Sólva Eystberg metir, at dysturin móti VÍF næstu vikuskifti› ver›ur sera avgerandi, men hon avskrivar als ikki VB enn, tí tær kunnu vera sera tungar at syfta á heimavølli.

Stórur munur

Dysturin var merktur av, at Sólja fekk fleiri spælarar vístar av vølli. Einafer› vóru tríggjar útvístar í senn, solei›is at Sóljan bara spældi vi› trimum útileikarum.

– Har var ikki nógv at gera. Vit hava trupulleikar vi› at koma nóg skjótt aftur í verjustø›u eftir álop, sigur Albert Ellefsen, venjari hjá Sóljuni.

Hann vísir á, at ein av orsøkunum til, at hansara li› fekk so nógvar spælarar riknar av vølli kann vera, at tær í mi›al eru minni enn hinar, og tí mugu tær strí›ast.

– Ein stórur trupulleiki hjá okkum er eisini, at vit hava ongar spælarar, sum skjóta vi› vinstru hond. Ta› er eitt stórt handikap í okkara álopsspæli, sigur Albert at enda.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Stjørnan: Annika Ljósstein 7(1), Anna K. Samson 6, Vesna Tomajek 5, Bára Skaale 4, Joan M. Joensen 4(1), Sólvá Eystberg 2(1), Una Olsen 1
Sóljan: Simona Dziugyte 4(1), Sólja Nielsen 3, Hertha Simonsen 3, Marjun Jørgensen 2, Heidi Haraldsen 2
Brotskøst: Stjørnan 8, Sóljan 3
Útvísingar: Stjørnan 2, Sóljan 7
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen og Justines Justinusen

gult cyan magenta svart

H71-KÍF 21-28 (11-12)

KÍF gjørdi bart

Ta› bragda›i endilig hjá kollfir›ingum, tá teir leygrdagin vitja›u hjá H71, men avgerandi hendingin í dystinum átti heldru at veri› til fyrimuns fyri heimali›i›

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Ta› er kanska ikki so løgi›, um kollfir›ingar eru av teirri fatan, at ta› als ikki hev›i veri› órættvíst, um okkurt anna› li› enn teirra átti ni›asta sessin í fremstu mansdeildini.

Í nógvum av dystunum, sum teir hava spælt, hevur ta› ri›i› um snari›, men so at siga hvørja fer› hava teir koritni veri› vi› undirlutan.

Givi› upp hava teir tó á ongan hátt, og at teir fyri stuttum fingu enn ein útlendskan leikara til landi›, bo›ar eisini frá, at teir ætla sær annan leiklut enn tann at ver›a botnli›.

Skiftandi í fyrra

N‡ggi leikarin, Ilian Topic, n‡tti heldur ikki langa tí› um at prógva, at hann av álvara skal roknast sum ein styrkur hjá kollfir›ingum.

Vi› teimum bá›um útlendsku á bakkplássunum hevur KÍF eisini fingi› størri breidd í bakspæli›, og fyrsta korteri› ella so var eisini líkt til, at hetta skuldi gera av vi› hoyvíkingarnar.

So vi› og vi› komu teir á heimali›num tó betri vi› í dystin. Bæ›i verja og álop hingu væl betri saman, og teir fingu nú rættiliga fatur á kollfir›ingum. Fram um megna›u teir tó ikki at vinna seg, men hetta var einamest einum væl leikandi Óla Kristian Djurhuus í málinum fyri at takka.

Reytt kort hjálpti skeiva li›num

Seinna hálvleik gekk at kalla javn á alla tí›ina. Spæli› var kanska ikki so væl skipa›, men fáu ásko›ararnir í høllini fingu um ikki anna› ein sera spennandi dyst at síggja.

Stórur var munurin onganti›, og spenta stø›an gjørdi eisini, at spælararnir løgdu alsamt meira orku í dystin.

Tá einir tíggju minuttir tók ein stø›a seg upp, sum í roynd og veru avgjørdi dystin. Ein skuldi kanska hildi›, at eitt reytt kort til KÍF skuldi givi› heimali›num fyrimun, men heldur var› ta› øvugt.

Hetta hendi, tá Kristjan Madsen var› ov seinur eftir Halli Danielsen. Úrsliti› var› reytt kort til Kristjan, men hendingin østi samstundis Halgir somiki› nógv, at hann samstundis noyddist tveir minuttir á beinkin.

Næstu løtuna gjørdu kollfir›ingar tr‡ mál á ra›, og tá so Stefan Dorofte eisini var› útvístur fyri heldur óney›ugt at toga í mótleikara, var ta› sum um korthúsi› hjá hoyvíkingum datt saman. Hóast eisini kollfir›ingar fingu tvær útvísingar, so noyddust hoyvíkingar nú at forsera› í álopsspælinum, og uttan stórvegis hóvasták kundu gestirnir gera sær dælt og avgera dystin.

Allir dystir telja

Vi› sigrinum sluppu kollfir›ingar nærri hinum li›unum í botnstrí›num, men umframt hetta, lætti hann helst eisini um sálarliga tr‡sti› á kollfir›ingarnar.

Meira enn ta einu fer›ina hava teir veri› sera óhepnir ikki at fáa stig, men ein slíkur dystur kann ikki anna› enn styrkja teir í trúnni um, at vi› vi› málrætta›um arbei›i ber til at koma burtur av aftasta sessinum.

Hoyvíkingar mistu hinvegin eitt gott høvi til at nærkast onkrum av fremru li›unum.

Ta› hava annars veri› fleiri tekin um, at ta› kanska fór at eydnast teimum at blanda seg, men skal ta› gerast veruleiki, er ney›ugt, at leikararnir í nógv størri mun standa saman. Ikki bert tá ta› er okkurt av ovaru li›unum, sum stendur hinu megin mi›linjuna, men so sanniliga eisini tá lægru støddu kappingarneytarnir skulu basast.



Ta› eydna›ist ikki hoyvíkingum at halda fast um gó›u gongdina, sum li›i› hevur havt í seinastuni

Mynd: Álvur Haraldse

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
H71: Anfinn N. Debess 5, Halgir Dahl Olesen 4, Hallur Danielsen 3, Johnny Duurhuus 2, Janus Joensen 2, Rene Dahl Olesen 2, Stefan Dorofte 2, Tróndur Vatnhamar 1
KÍF: Iljan Topic 9, Dorica Tomic 7(3), Vagnur Johannesen 4, Petur Martin Johansen 3, Kistjan Madsen 2, Jákup Dam 2, Frí›rik Joensen 1
Brotskøst: H71 2, KÍF 4
Útvísingar: H71 5, KÍF 4
Diskvalifikatión: KÍF 1 (Beinlei›is reytt)
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen. Dugdu væl at halda linjuna ígjøgnum dystin, og komu yvir høvur væl frá uppgávuni.

VB-Kyndil 33-19 (20-13)

VB fekk lætt spæl



Millum tær, sum ikki fingu hjálpt Kyndli i Vági telist Kristina Holm, sum heur ska›a í knænum

Kyndil hev›i einans seks útileikarar vi› til Vágs, og tí kundi ta› ikki anna› enn enda vi› tryggum sigri til VB, tá li›ini hittust fríggjadagin

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Ta› var onganti› líkt til, at talan skuldi gerast um nakran spennandi dyst millum VB og Kyndil, tá li›ini hittust fríggjadagin.

Stø›an hjá kyndilsvenjaranum var nevnliga alt anna› enn gó› undan dystinum. Fleiri avbo› komu í evstu løtu, og tískil taldi leikarahópurin bert átta leikarar. Tvær til at verja máli› og seks útileikarar.

Orka›u ikki

Dysturin gekk tí á lei› solei›is, sum ein kundi vænta›.

Fyrstu løtuna megna›i Kyndil at fylgja vi›, men tá útskiftingar ikki kundu gerast, fór mø›in skjótt at gera seg galdandi, og seinastu løtuna av fyrra hálvleiki leyp VB avsta›, uttan at Kyndil hev›i nakran sum helst møguleika at fylgja vi› teimum.

Í seinna hálvleiki kundi VB taka sær av løttum, og her n‡ttu tær høvi› til at n‡ta allan beinkin, solei›is at allar sluppu at fáa naka› av dystarvenjing.

Fylgja vi›

Vi› sigrinum gjørdi VB sítt til, at tær enn hava so nøkun lunda samband vi› bæ›i VÍF og Stjørnuna.

Enn er teirra møguleiki í gullstrí›num ikki heilt burturi, men fyri at røkka hesum ver›ur eisini ney›ugt at vinna á onkrum av ovaru staddu li›num.

Fyrta høvi til hetta ver›ur ikki fyrr enn í januar mána›i, tá Stjørnan kemur á vitjan í Vági.

Fyri Kyndil var her talan um mittasta dystin í eini viku, sum úrslitaliga skuldi gerast ein sonn katastrofa fyri li›i›.

Eitt er, at tær í VB hittu eitt mótstø›uli›, sum í ár tykist vera heldur betri fyri enn havnarli›i›, men at koma su›ur vi› bert seks útileikarum kann ikki metast sum nøktandi fyri nakran av pørtunum. Serliga ikki tá talan er um eitt somiki› stórt felag sum Kyndil.

Dysturin í tølum

Málskjúttar
VB: Rannvá Augustinussen 7, Regina Radó 7(1), Guri› Mortensen 6(1), Andrea Lütz 5, Sórun Krosslá 4(1), Ey›britt Krosslá 2, Margri:th Augustinussen 1, Mary Krosslá 1
Kyndil: Signhild Petersen 5(3), Jórun Ludvig 5, Anita Kjærbo 4, Jensia Petersen 3, Brynhild Klein 2(1)
Brotskøst: VB 5, Kyndil 6
Útvísingar: VB 2
Dómarar úr Tjaldri: Dánjal Hansen og Kári Hansen